# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 24.04.2026 |
| Mál nr.: | 26/05038 |
| Málsviðgjørt: | TM, BAB, EC, MJ |
| Ummælisfreist: | N/A |
| Eftirkannað: | 19.02.2026 |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Búskaparráð**
(Áseting um eina árliga konjunkturfrágreiðing og eina árliga temafrágreiðing)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 72 frá 5. mai 2021 um Búskaparráð, verður § 3 orðað soleiðis:

"**§ 3.** Búskaparráðið ger eina konjunkturfrágreiðing um árið, sum verður almannakunngjørd 1. mars.

*Stk. 2.* Búskaparráðið skrivar eina temafrágreiðing um árið og kann ráðgeva landsstýrinum í øðrum málum."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Verandi lóg um Búskaparráð ásetir, at gjørdar verða tvær konjunkturfrágreiðingar um árið, onnur 1. mars og seinna 1. september.

Konjunkturfrágreiðingin er ætlað at vera kunning til politiska myndugleikan, leiðslur í privatum fyritøkum og til almenningin um verandi gongd og væntaðu gongdina í føroyska búskapinum.

Hendan broytingin fer at gera, at ein konjunkturfrágreiðing verður gjørd um árið beint fyri, at játtanarkarmarnir skulu leggjast fram 1. apríl. At leggja eina konjunkturfrágreiðing fram 1. mars hóskar seg betur, tí tá fær Búskaparráðið gjørt greiningar við støði í nýggjum hagtølum frá Hagstovu Føroya fyri undanfarna ár.

Konjukturfrágreiðingin 1. september verður við uppskotinum strikað. Í staðin skal Búskaparráðið gera eina temafrágreiðing um árið. Dagfestingin fyri eina konjunkturfrágreiðing 1. september er óheppin. Flestu tjóðarbúskaparligu hagtøl frá Hagstovu Føroya fyri undanfarna ár vera almannkunngjørd í oktobur og frameftir. Harafturat er 1. september so stutt eftir summarfrítíðina, at avbjóðandi er at fáa gjørt frágreiðingina til lítar.

Tí verður heldur mælt til, at avmarkaða orkan í Búskaparráðnum verður brúkt til at gera eina konjunkturfrágreiðing um árið og eina temafrágreiðing um árið. Temafrágreiðingar hyggja nærri at búskaparliga bygnaðinum, og ráðgeving um bygnaðarligar broytingar er eisini ein neyðug og týðandi uppgáva.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Lógargrundarlagið undir Búskaparráðnum er lógin um Búskaparráð frá 2021. Galdandi lóg um Búskaparráð ásetir, at gjørdar verða tvær konjunkturfrágreiðingar um árið, onnur 1. mars og seinna 1. september.
Víst verður eisini til brot 1.1.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at gera arbeiðið hjá Búskaparráðnum smidligari og at brúka avmarkaða orkuna hjá ráðnum betri. Endamálið er at lýsa konjunkturstøðuna í búskapinum eina ferð um árið umframt at lýsa bygnaðarlig viðurskifti í búskapinum við temafrágreiðingum.
Víst verður eisini til brot 1.1.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við lógaruppskotinum verður farið frá at gera tvær konjunkturfrágreiðingar um árið til at gera eina konjunkturfrágreiðing og eina temafrágreiðing um árið.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið er gjørt í samráði við Búskaparráðið og Landsbankan og hevur ikki verið í hoyring.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar við sær fyri landið ella fyri kommunurnar.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Verður uppskotið samtykt, fer tað at gera arbeiðið hjá Búskaparráðnum smidligari og fer at tryggja, at avmarkaða orkan hjá ráðnum verður betri gagnnýtt. Aðrar umsitingarligar avleiðingar eru ikki av lógaruppskotinum fyri land ella fyri kommunur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Eingin millumtjóðasáttmálar eru viðkomandi fyri hetta lógaruppskotið.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Eingin tvørgangandi millumtjóðasáttmáli er viðkomandi fyri hetta lógaruppskotið.

### 2.9. Markaforðingar og flytføri
Lógaruppskotið hevur ikki markaforðingar við sær og ávirkar ikki flytførið á nakran hátt.

### 2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv við sær.

### 2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

### 2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

### 2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ongar skyldur til likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

### 2.14. Leggur uppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki nakrar heimildir til landsstýrisfólkið ella kommunurnar.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Heimilar uppskotið viðgerð av persónsupplýsingum?**
Lógaruppskotið heimilar ikki viðgerð av persónsupplýsingum.

**2.17. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn at tær, sum eru nevndar omanfyri. Víst verður eisini til brot 1.4.

**2.18. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Uppskotið til § 1, stk. 1 ásetur, at tað frameftir verður skrivað ein konjunkturfrágreiðing um árið og ikki tvær, og at hon skal almannkunngerast 1. mars.

Broytingarnar, sum henda í føroyska búskapinum, eru ikki so stórar og skjótar, at tað er alneyðugt at gera tvær lógarfestar konjunkturfrágreiðingar árliga.

Dagfestingin 1. mars er meira hóskandi at koma við eini konjunkturfrágreiðing, samanborið við dagfestingina 1. september. 1. mars er beint fyri, at Fíggjarmálaráðið sbrt. lóg leggur fram játtanarkarmarnar. Harafturat eru nýggjastu hagtølini um búskapin frá Hagstovuni fyri seinasta árið tøk, og hesi eru grundarlagið undir konjunkturfrágreiðingini.

Eisini er dagfestingin 1. september ikki hóskandi, bæði tí nýggj og dagførd tjóðarroknskaparhagtøl ikki eru tøk fyrr enn í oktober, men eisini tí at 1. september er so stutt eftir summarfrítíðina, og tað tí er sera avbjóðandi at fáa gjørt frágreiðingina.

Uppskotið til § 1, stk. 2 ásetur, at Búskaparáðið í staðin fyri tvær konjunkturfrágreiðingar árliga, skal gera eina konjunkturfrágreiðing og eina temafrágreiðing um árið.

Temafrágreiðingar viðgera eitt ávíst evni meira nágreiniliga. Eitt nú hevur búskaparráðið gjørt eina greining av fíggjarpolitiska haldførinum í 2024 og á heysti 2025 vóru kommunurnar viðgjørdar.

Við hesum fær Búskaparáðið til uppgávu bæði at hyggja eftir og viðgera búskaparligu konjunkturarnar og búskaparliga bygnaðin.

**Til § 2**
Uppskotið til § 2 er gildiskomuáseting. Skotið verður upp, at løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fíggjarmálaráðið, 24.04.2026.

**Aksel V. Johannesen**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur